# Seinasti arbeiðsdagur á B6 á Landssjúkrahúsinum

**Hendir ikki okkurt heilt óvæntað, er dagurin í dag seinasti arbeiðsdagurin hjá 18 sjúkrasystrum á B 6 á Landssjúkrahúsinum**

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
*Áki Bertholdsen*

– Nú fara vit í jólafríð. So má leiðslan á Landssjúkrahúsinum og Landsstýrið um rest.

Á B 6 á Landssjúkrahúsinum eru tey farin at ásanna, at allar royndir at finna semju við leiðsluna á Landssjúkrahúsinum, eru slitnaðar.

Ikki færri enn 18 av teimum 23 sjúkrasystrunum, sum arbeiða á B 6 á Landssjúkrahúsinum hava sagt upp og fara úr starvi 31. desember.

Nakrar royndir eru gjørdar at finna semju ímillum partarnar, so at uppsagnirnar verða tiknar aftur, men alt hevur verið til fánýtis.

Sjúkrasystrarnar á B 6 á Landssjúkrahúsinum standa við sítt: Tær vilja hava fleiri fólk. Samstundis stendur leiðslan á Landssjúkurahúsinum eisini við sítt: Tað verða ikki fleiri fólk sett a B 6.

Ingun Gaardbo, álitisfólk hjá sjúkrasystrunum á B 6, sigur, at sostatt standa uppsagnirnar við.

Mikudagin var ein stuttur fundur ímillum sjúkrasystrarnar og leiðsluna á Landssjúkrahúsinum, men Ingun Gaardbo sigur, at hann broytti onki.

– Leiðslan endurtók, at fleiri fólk verða ikki sett á B 6 og so er onki at gera.

Sambært útvarpinum mikukvøldið hevði leiðslan á Landssjúkrahúsinum fingið ta fatan, at sjúkrasystrarnar nú vóru meiri vælviljaðar, enn tær hava verið.

– Eg veit ikki, hvussu leiðslan hevur fingið ta fatanina, tí støðan hjá okkum er heilt avgjørt óbroytt, sigur álitisfólkið á B 6.

Hon sigur, at merkist eisini á sjúklingunum, at teir stúra fyri gongdini og tað er kanska tað ringasta av øllum, leggur hon afturat.



*Í dag verða ljósini sløkt á B 6. Deildin letur aftur í dag og hendur ikki eitt undur ein av fyrstu døgunum, letur hon ikki uppaftur*

## Seinasti arbeiðsdagur

Hóast sjúkrasystrarnar fara úr starvi 31. desember, er dagurin í dag teirra seinasti arbeiðsdagur.

Ætlanin var, at B 6 skuldi lata aftur í dag og so verða afturlatin um árrskiftið. Hon skuldi lata uppaftur 7. januar.

Sostatt fara sjúkrasystrarnar heim í dag og koma ikki aftur.

Heldur ikki til blaðið í dageydnaðist at fáa viðmerking frá leiðsluni á Landssjúkrahúsinum.

Men Marin Vang, røktarfakligur stjóri, hevur áður sagt, at farast skuldi beinanvegin undir at umskipa B 6 og tey hava longu søkt eftir nýggjum sjúkrasystrum og sjúkrarøktarum.

Sí annars viðmerkingar til støðuna frá Sjúkrasystrafelag Føroya á síðu 10 í blaðnum í dag.

Har vísir Jana Dalsgaard, forkvinna í felagnum á, at tað fer at fáa óbótaligan skaða fyri sjúklingin, starvsfólkið og samfelagið, um tað ikki eyndast at finna semju um arbeiðsviðurskiftini á B 6.

Hon heldur eisini, at nú er stundin komin til, at politiski mynduleikin vaknar og tekur um endan.

– Landsstýrismaðurin í almanna og heilsumáluum, Sámal Petur í Grund, hevur fyrr sagt, at málið ikki var búgvið hjá honum at leggja seg út í, men nú er tað væl hansara skylda, sigur sjúkrasystrafelagið.

# Dansur í Hvalba við royki og fýrverki

**Hetta verður seinastu ferð í langa tíð, at høvi verður at hoyra okkara fremsta dansibólk, All That Rain**

RIMMAR DANSUR
*Áki Bertholdsen*

Okkara fremsti dansibólkur, All That Rain, hevur ikki verið so nógv at hoyrt seinastu mánaðirnar. Men í annaðkvøld verður so ein av hesum sjáldsomu møguleikum at hoyra teir á palli, tá ið teir spæla í Roynhøllini í Hvalba.

Hetta verður samstundis seinastu ferð í langa tíð, at All That Rain spælir til dans, men tað verður ikki við mýkindum, tí teir hava meiri royk og størri ljós og kraftigari fýrverk enn teir nakrantíð áður hava havt

Trummusláarin í bólkinum, Henning Nicodemussen, er farin til Keypmannahavnar á tekniska skúla a í samband við útbúgving sína, og hann verður ikki aftur í Føroyum, fyrrenn í summar.

– Tað er ov strævið at ferðast heim hvørt vikuskifti at spæla. Og harafturat er veðrið ofta ringt um veturin, so flogsambandið kann verða óregluligt. Tí hava vit gjørt av at halda ein steðg nú, til eg eri komin heimaftur, sigur trummusláarin.

– Tí er ilt at siga, nær vit fara at spæla aftur og enn minni, nær vit fáa høvi at vitja Suðuroynna aftur, leggur hann afturat.

## Aðru ferð

Annar hevur All That Rain ikki verið so nógv at hoyrt seinastu tíðina. Teir hava fingið nýggjan sangara og gittarspælara, sum skuldi spælast inn í bólkin og teir hava givið fløgu út.

–Vit hava verið í venjingarhølinum síðani



*All That Rain sigur nú farvæl fyribils. Tað gera teir við rimmar dansi í Hvalba í annaðkvøld við meiri royki, størri ljósum og kraftigari fýrverki enn nakrantíð. Aftast frá vinstru eru teir Henning Nicodemussen, Jens Tummas Næs og fremst er nýggi sangarin og gittarspælarin, Hans Ravnsfjall*

mitt í september við nýggja sangaranum og gittarspælaranum, Hans Ravnsfjall, og vit hava bara spælt einaferð til stóran dans , síðani hann kom uppí. Tað var síðsta leykarkvøld, tá ið vit spældu í ítróttarhøllini í Kambsdali. Tað var eitt sera væleydnað tiltak, við fleiri enn 600 áhoyrarum, sigur Henning Nicodemussen.

Annars hevur bólkurin spælt á ymsum, smærri tiltøkum, jólaborðhaldum o.sa.fr, men ikki alment í teimum stóru hallunum, sum teir plagdu.

Men nú fáa so suðuroyingar høvi til at heilsa uppá nýggja mannin í All That Rain.

– Dansurin í hvalba í annaðkvøld er fyrstu ferð, vit spæla í Suðuroynni við nýggja sangaranum og gittarspælaranum, so vit gleða okkum ómetaliga nógv at lata suðuroyingar sleppa at hoyra okkum við nýggjari manning.

Annars hevur All That Rain ikki spælt í Suðuroy síðani í juli mánaða í fjør, tá ið teir spældu í Trongisvági saman við Tangz.

## Fjølbroytt tilfar

Í Hvalba fer All That Rain at spæla fjølbroytt tilfar. Teir spæla løg, teir sjálvir hava gjørt, men teir spæla eisini nógv kend, eldri løg, sum altíð eru aktuell, men sum teir hava peppað upp. Men tað er eisini nógv, spildurnýggj løg, sum eru á hittlistunum í løtuni og All That Rain spælir bæði Limpkin Park og Alien Ant Farm.



# Byggi Service skift eigara

**Byggifelagið Arcticon í Havn hevur keypt Byggi Service á Skála. Hóast leiðslan í framtíðini verður tann sama í báðum feløgunum, fer virksemið at halda fram sum áður hjá hvørjum felagnum sær**

BYGGIVINNA
*Edvard Joensen*



*Jón Danielsen verður í framtíðini stjóri hjá bæði Arcticon og Byggi Service*

*Mynd: Edvard Joensen*

Byggifelagið Byggi Service á Skála hevur skigft eigara. Teir báðir Kaj Olsen og Hjørleif Gaard hava selt felagnum Arcticon í Havn Byggi Service.

Arcticon, sum nú hevur keypt Byggi Service, er nýtt byggifelag. Tað varð stovnað í vár, og stjóri er Jón Danielsen, sum fram til 31. mars í ár var stjóri á Skipasmiðjuni á Skála.

Jón Danielsen var á Skipasmiðjuni á Skála í tvey ár, og undan tí var hann átta ár í starvi hjá byggifelagnum J&K Petersen, har hann millum annað hevði ábyrgdina av arbeiðinum, felagið gjørdi í Íslandi.

Jón Danielsen sigur, at nú bæði feløgini koma undir sama hatt, so at siga, verður betri møguleiki fyri samstarvi. Eitt nú fer at bera betri til at gagnnýta ta vitan, sum neyðug er í vinnuni, enn um bæði feløgini skuldu havt til dømis bæði verkføðingar og arkitektar.

Byggi Service fæst við vanligt byggiarbeiði á landi, eins og felagið hevur gjørt nógv av at arbeiða umborð á skipum, eitt nú fyri Skipasmiðjuna á Skála.

Nevnast kann, at Byggi Service hevur verið við til at umbyggja vaktarskipið Thorland, sum Esvagt-Thor hevur latið umbyggja á Skála.

Av virksemi, Byggi Service hevur í dag, nevnir Jón Danielsen Tinghúsið og Føroya Sparikass í Hornabø í Havn, eins og felagið eisini ger eina handilshøll í Rituvík fyri Klement Petersen í Runavík.

Arcticon, sum mest fæst við jørð og betong arbeiði, hevur tó eisini okkurt størri byggiarbeiði í gongd. Teir eru í løtuni við at leggja seinastu hond á nýbyggingina hjá Elektron á Hálsi, greiðir Jón Danielsen frá.

Tað næsta stóra arbeiðið, sum Arcticon fer undir, er ein nýggjur smiðjubygningur hjá Tórshavnar Skipasmiðju. Hann skal reisast har, Fiskacentralurin í síni tíð var. Gamla Fiskacentralin hevur Arcticon tikið niður.

Jón Danielsen sigur, at leiðin, vit skulu ganga, er at leggja slíkar fyritøkur samn undir ein hatt. Soleiðis gerast vit sterkari á marknaðinum og kunnu veruliga byrja at kappast við útlendingar um størri arbeiði. Bæði her hjá okkum sjálvum og úti í heimi.

Smáar fyritøkur við 8-10 monnum duga ikki í slíkum høpi, vísir hann á. Tað fer ov nógv tíð til annað enn tað, tann ávísi skal gera. Eitt nú at teknikararnir brúka upp í hálvar dagar at ganga ørindi, meðan annað so má bíða, ber ikki til.

Nú Arcticon og Byggiservice fara at samstarva, er tað júst eitt stig á teirri leiðini, sigur hann.

Tað arbeiða umleið 20 fólk hjá hvørjum av hesum báðum byggifeløgunum, sum Jón Danielsen nú er stjóri fyri, og tey fara at halda fram í sama starvi, tey eru í.

Annar av gomlu eigarunum av Byggi Service, Kaj Olsen, er framvegis arbeiðsformaður í Byggi Service, meðan Hjørleif Gaard í framtíðini fer at arbeiða sum handverkari, skilst.

# Mótmæla flyting

**Vestmenningar mótmæla, at fútin ætlar at flyta sýslumansembætið úr Vestmanna til Havnar. Tingmenn í Norðurstreymoy hava lagt málið fyri Løgtingið**

FLYTING
*Edvard Joensen*

Í Norðurstreymoy dámar teimum illa, at tosað verður um at flyta sýslumannin til Havnar. So illa, at bæði Vestmanna Bygdarráð og løgtingsmenninir hava mótmælt alment.

Í meira enn 100 ár hevur sýslumaðurin búð í Vestmanna, og vestmenningar kenna seg líkasum hava hevdsrætt upp á hann. Hann er, og hann skal verða verandi í Vestmanna, meina teir.

Tá tað her fyri frættist, at fútin var farin at hugsa um at flyta sýskumansembætið til Havnar, gjørdi Vestmanna Bygdarráð vart við seg og mótmælti hesum beinanveg.

Tey halda tað ver løgið, nú almenn fyrisiting annars skal leggjast út í ymisk øki, at fútin fer at draga annan veg. Í hesum teldu- og internettíðum má tað bera til at hava eina slíka umsiting í Vestmanna, hóast høvuðsskrivstovan hjá fútanum er í Havn, heldur Vestmanna Bygdarráð.

Bygdarráðið ger í mótmælinum eisini vart við, at tey kunnu als ikki góðtaka, at eingin løgreglumaður kemur at hava starv við Vestmanna sum støði, um flytingin verður, sum fútin ætlar.

Hans Pauli Strøm, tingmaður Javnaðarfloksins í Norðurstreymoy, tekur undir við bygdarráðnum og hevur á Løgtingi spurt, um ríkisumboðið kann greiða Løgtinginum frá, um fútin hevur slíkar ætlanir.

Eisini ein annar Norðstreymoyar tingmaður, Jógvan Durhuus úr Tjóðveldisflokkinum, hevur tikið málið til sín. Hann hevur sent Høgna Hoydal, landsstýrismanni við lógarmálum, bræv, har heitt verður á landsstýrismannin um beinanveg at gera fútanum og danska Løgmálaráðnum greitt, at hendan ætlanin eigur at steðgast alt fyri eitt.

Høgni Hoydal hevur sent áheitanina víðari til danska løgmálaráðharran Lenu Espersen.


